umhvørvisstovan

FA. ENDURVINN

HANS JACOB POULSENBØRKUGØTA 21
530 FUGLAFJØRÐUR
FØROYAR

Argir hin 13. desember 2011
Málsnr.: 10/00729-12
Málsviðgeri: Eyð Eidesgaard

# Umhvørvisgóðkenning

# FA. ENDURVINN

## 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av Fa. Endurvinn, matr. nr. 882$^{e}$ í Fuglafirði, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum seinast broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 15. desember 2010 umsókn um umhvørvisgóðkenning til móttøku og goymslu av metalskrotti, trolum og nótum sum skulu avskipast til endurvinning.

Saman við umsóknini og eftirfylgjandi hevur Umhvørvisstovan móttikið fleiri upplýsingar um virksemið.

Tað móttikna tilfarið, umframt vitjan hjá Fa. Endurvinn, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 3. Lýsing av virkseminum

Virksemið hjá Fa. Endurvinn fevnir um móttøku, goymslu og útflutning av metali, troli og nótum til endurvinning. Virkið heldur til á norðara enda á matr. 882$^{e}$ millum Brýnið 1 og 3 í Fuglafirði í einum skúri, ið er uml. 60 $m^2$ til støddar. Økið er lagt út til Øki D: Havnarøki. Nærmastu grannahús eru uml. 20 metrar frá virkinum, og eru somuleiðis staðsett á Øki D: Havnarøki. Nærmastu hús á Øki B: bústaðarøki eru uml. 45 metrar frá virkinum.

Goymslan av metallutum er innandura, og fevnir um goymslu av m.a. rustfríum stáli, aluminium, kopari, messing og blýggi. Harafturat er nakað av akkumulatorum á innandura goymsluni. Virkið hevur ikki ætlanir um at fara undir goymslu av jarni og metallutum, sum eru dálkaðir við t.d. olju.
Trol og nótir verða heintaðar beinleiðis frá skipum ella goymslum á landi, lagt í bingju og sendar til endurvinningar.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Nakað av óljóði kann standast av virkseminum at skilja metallutir, og tí eru treytir settar til hetta.

Akkumulatorar eru at rokna sum serliga dálkandi burturkast, og skulu tí handfarast og goymast á skynsaman hátt, so dálking ikki stendur av hesum.

Virksemið verður ikki mett at elva til umhvørvisligan ampa av royki, dusti, lukti, ljósi ella ristingum.

## 5. Viðgerð

Henda umhvørvisgóðkenning hevur við sær, at Fa. Endurvinn kann byrja sítt virksemi, sum virkið hevur lýst í síni umsókn til umhvørvisgóðkenningina.

Av tí at eini sethús liggja í Øki D, sum er Havnarøki, verða serligar treytir settar til óljóð frá virkseminum.

Eisini verða treytir settar til, at burturkast, sum verður útflutt, einans kann sendast til endurnýtslu ella endurvinningar og einans til góðkendan móttakara. Um burturkast verður útflutt til onnur lond enn Danmark, kann gerast neyðugt, at avvarðandi myndugleiki í móttakaralandi skal góðkenna innflutningin. Tí verður treyt sett um, at øll neyðug loyvi skulu fáast til vega, áðrenn nakar útflutningur av burturkasti fer fram.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til Fuglafjarðar kommunu og Fa. Endurvinn til viðmerkingar tann 4. mai 2011. Ongar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at virkið ikki elvir til ampar í nærumhvørvinum,
- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð, og fyribyrgja ampum av óljóði,
- at umhvørisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at slag, nøgd og móttakarar av burturkasti verður skrásett.

# 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

## 6.1. Almennar treytir

6.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.3. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av felagnum.

6.1.4. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.1.6. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.7. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð, enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.8. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2. Innrætting

6.2.1. Virkið skal innrættast og rekast, sum ávíst í móttiknum tilfari.

6.2.2. Øki, sum hoyra til virkið, skulu haldast ruddilig og rein

6.2.3. Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt (ella innhegnað).

6.2.4. Einki vatn frá økinum rundanum má renna inn á plássið.

6.2.5. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]), og skal tøk reinsiútgerð altíð nýtast til fulnar, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt.

6.2.6. Er virksemið ikki byrjað innan eitt ár frá tí at umhvørvisgóðkenningin er lýst, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

---

[1] Best Available Techniques. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til hvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

## 6.3. Óljóð, ristingar og ljós

6.3.1. Virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

6.3.2. Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | Mán. – frí. kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14 | Mán. – frí. kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22 | Allar dagar<br>kl. 22 - 07 |
|---|---|---|---|
| **Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB(A) | 70 dB(A) | 70 dB(A) |
| **Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB(A) | 60 dB(A) | 60 dB(A) |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB(A) | 45 dB(A) | 40 dB(A) |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB(A) | 40 dB(A) | 35 dB(A) |

6.3.3. Markvirðini í talvu 1 eru galdandi fyri óljóðsávirkanina á umhvørvið (immissiónina). Fyritøkan skal sostatt halda markvirðini, sum eru galdandi fyri tað øki, sum tað er staðsett, og samstundis ikki elva til meira óljóð í økjunum uttanum enn ásett í talvu 1.

6.3.4. Grannahúsini, sum liggja á havnarøkinum, verða mett at vera staðsett í Øki 2 í vanligari arbeiðstíð (mán.-frí. kl. 07-18; leyg. kl. 07-14) og í Øki 3 til allar aðrar tíðir.

## 6.4. Goymslur til kemikalii og/ella dálkandi evni

6.4.1. Flótandi og fast serliga dálkandi burturkast skal goymast í íløtum, sum eru egnað til endamálið, og sum eru merkt, soleiðis at tað sæst, hvat er í.

6.4.2. Undirlagið á goymsluni skal verða tætt.

6.4.3. Møguligar lekar og spill skulu kunna haldast aftur í t.d. savningarbrunni, bakka ella við at hava ein stoyptan kant, sum rúmar innihaldinum í tí størsta ílatinum.

6.4.4. Goymslur skulu kunna læsast fyri óviðkomandi.

## 6.5. Burturkast

6.5.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[3].

6.5.2. Burturkast, sum verður útflutt, skal einans sendast til endurnýtslu ella endurvinningar og einans til góðkendan móttakara.

6.5.3. Áðrenn nakar útflutningur av burturkasti fer fram, skulu neyðug loyvi fáast til vega.

6.5.4. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

---

[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.
[3] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

6.5.5. Virkið skal regluliga avhenda burturkastið soleiðis at nøgdin á goymsluni ikki verður til nakran ampa.

6.5.6. Tilfar, sum verður sent til endurnýtslu ella endurvinningar, er eisini at roknað sum burturkast, og er sostatt umfatað av omanfyristandandi treytum.

## 6.6. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

6.6.1. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd og slag av burturkasti, sum er útflutt til endurnýtslu og endurvinningar
- Nøgd og slag av burturkasti annars
- Móttakarar av burturkasti
- Rakstrartrupulleikar/óhapp

6.6.2. Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.6.3. Skrásetingarnar smb. pkt. 6.6.1 skulu verða eftir galdandi kotum í evropeiska burturkastskataloginum (EAK-kotur) og nýtast skulu 6 siffur.

6.6.4. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í minst fimm ár.

6.6.5. Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m. skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

## 6.7. Innaneftirlit

6.7.1. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð verða hildnar.

6.7.2. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

6.7.3. Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.7.4. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av virkinum.

## 6.8. Óhapp

6.8.1. Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.8.2. Virkið skal hava mannagongdir til fyribyrging av dálkingaróhappum og til uppruddingar eftir møgulig óhapp.

6.8.3. Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og uppruddingar.

6.8.4. Størri útlát ella dálking skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til uppruddingar v.m. skal sendast Umhvørvisstovuni[4].

---

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Suni Petersen, deildarleiðari / Eyð Eidesgaard, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Fuglafjarðar kommuna, Ennivegur 38, FO-530 Fuglafjørður
Landslæknin, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn